


## Ballack og Drogba klárir

Hóast Chelsea nú hevur spælt seg víðari til næsta umfarið í Champions League, so var tað ikki, sum vigaði mest í eftirmetingini hjá José Mourinho. Chelsea-venjarin var hinvegin ovurhonds fegin um, at skaðarnir hjá Didier Drogba og Michael Ballack ikki tykjast serliga álvarssamir. Teir báðir fingu snuddir í dystinum mikukvøldið, men sum skilst, so eru teir longu tøkir sunnudagin, tá stórdystur er á skránni í Premier League. Tá skal Chelsea nevnliga spæla móti Manchester United.

## Dýrur Liverpool-sigur

Hóast tey við Merseyside fegnaðust um sigurin á PSV Eindhoven, so tóktist hesin sigurin eisini at kosta sítt. Longu undan steðginum noyddust Xabi Alonso og Mark Gonzalez av vøllinum við skaða, og eftir steðgin legðist Jermaine Pennant afturat hesum listanum.

# Barcelona hevur ein kjans eftir

**Europeisku meistararnir eru kroystir í sínum bólki í Champions League. Liverpool heldur stílin í Europa, og Chelsea er komið víðari, hóast liðið tapti í gjárkvøldið**



*Eidur Gudjohnsen og liðfelagarnir í Barcelona hava framvegis møguleikan at koma víðari í Champions League*

*Mynd: Scanpix*

CHAMPIONS LEAGUE

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dynamittbólkurin í Champions League stendur nú til at spreingja. Eftir næstseinasta umfarið í gjárkvøldið er tað greitt, at europeisku meistararnir úr Barcelona fáa sín seinasta kjans fyri at tryggja sær luttøkuna í áttandaparts finalunum næsta ár.

Úrslitini í bóli A lagaðu seg soleiðis, at Chelsea tryggjaði sær víðari luttøku, hóast liðið tapti útivølli í Bremen. Heimaliðið skoraði einasta málið á Weserstadion, og Werder Bremen dró seg upp á javnt við Chelsea.

Barcelona spældi á útivølli í Sofia, og har vann spanska liðið 2-0. Franski álopsspælarin Guily skoraði tíðliga í dystinum, og miðvallarin Iniesta legði eitt mál afturat í seinna hálvleiki.

Støðan í bólki A er nú tann, at Chelsea og Werder Bremen hava 10 stig í part, meðan Barcelona hevur 8 stig. Chelsea er betur innanhýsis enn Bremen, og tí er Chelsea komið víðari áðrenn seinasta umfar.

Í seinasta dystinum hittast júst Barcelona og Werder Bremen, og tað verður eitt rættiligt brak av einum dysti, tí bert eitt av teimum feløgunum kann koma víðari í kappingini. Dysturin verður spældur 5. desember.

- Tað var týdningarmikið, at vit sloppu undan at fáa fleiri skaðar í hesum dystinum. Nú hava vit ein dyst eftir, og vit skulu vinna á Bremen. Tað eri eg vísur í, at vit fara at klára, segði venjarin Frank Rijkaard við fjølmiðlarnar eftir dystin.

**Gerrard sum James Bond**

Liverpool hevur stórar trupulleikar í heimligu kappingini, har serliga úrslitini á útivølli hava verið vánalig. Í Champions League er støðan ein heilt onnur, tí har er Liverpool fremst í síni bólki og hevur ongan av teimum fimm dystunum higartil tapt.

Í gjárkvøldið spældi Liverpool toppdyst í bólkinum ímóti hollendska felagnum PSV, og Liverpool vann dystin 2-0 við málum, sum vórðu skotin í seinna hálvleiki.

Liverpool hevði yvirlutan alla tíðina, og sum ikki einaferð var tað Steven Gerrard, sum var stóra drívmegin á liðnum. Eftir at Xabi Alonso og Mark Gonzales noyddust av vøllinum við skaðum longu í fyrra hálvleiki, var enn meira lagt í hendurnar á Gerrard, og hann sveik ikki.

Hann legði Liverpool á odda 1-0, og seint í dystinum økti Peter Crouch til 2-0. Báðu ferðirnar var tað hollendski álopsspælarin Dirk Kuyt, ið hevði næstseinasta fótin á bóltinum.

Nýggi James Bond, sjónleikarin Daniel Craig, segði herfyri, at Steven Gerrard hevði verið ein góður avloysur sum Bond, tá ið hann sjálvur gevst í leiklutinum. Í øllum førum kann enn einaferð staðfestast, at Gerrard eigur lívið í Liverpool í europeiskum dysti.

Tað er greitt, at Liverpool og PSV koma víðari frá bólki C.

**Roma í trupulleikum**

Fýra aðrir dystir vóru eisini spældir í gjárkvøldið. Í bólki B var týska Bayern á vitjan hjá Spartak Moskva, og dysturin endaði við javnleiki 2-2. Russiska liðið legði seg á odda, men tá ið Pizarro hevði skorað tvey frálík mál, líktist alt sær sjálvum, og Bayerm var á veg ímóti sigrinum. Men tað eydnaðist Spartak Moskva at javna til endaliga úrslitið 2-2.

Í hinum dystinm í bólki B syrgdi gamli málrevurin Hernan Crespo fyri, at Inter vann 1-0 á Sporting Lissabon. Bayern og Inter eru komin víðari frá bólkinum, men Inter hevur framvegis møguleikan at toga seg upp á fremsta plássið í bólkinum.

Roma skapti sær sjálvum trupulleikar, tá ið liðið tapti 1-0 á útivølli í móti Shaktar Donetsk. Ukrainska liðið var tað betra í dystinum, og Inter hevði stóran part av dystinum trupulleikar við at skapa kjansir.

Í hinum dystinum í bólki D vann Valencia 2-0 á Olympiakos, og spanska liðið hevur vunnið bólkin. Roma liggur næstfremst, men Shaktar er bert tvey stig aftanfyri undan seinasta umfarinum.Í seinasta dystinum skal Roma spæla á útivølli ímóti Bayern, meðan Shaktar skal til Lissabon at spæla.

Seinastu dystirnir í bólkaspælinum í Champions League verða spældir 5. og 6. desember.

### Úrslit, Champions League

**Bólkur A**

| | |
|---|---|
| Levski Sofia-Barcelona | 0-2 |
| Werder Bremen-Chelsea | 1-0 |

**Bólkur B**

| | |
|---|---|
| Spartak Moskva-Bayern München | 2-2 |
| Inter Milan-Sportin Lissabon | 1-0 |

**Bólkur C**

| | |
|---|---|
| Bordeaux-Galatasary | 3-1 |
| Liverpool-PSV Eindhoven | 2-0 |

**Bólkur D**

| | |
|---|---|
| Shakhtar Donetsk-Roma | 1-0 |
| Valencia-Olympiakos | 2-0 |

**Champions League, bólkaspælið**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bólkur A** | | | | | | | | | | |
| 1 Chelsea | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 4 | 4 | 10 |
| 2 Werder Bremen | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 10 |
| 3 Barcelona | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 10 | 4 | 6 | 8 |
| 4 Levski Sofia | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |
| **Bólkur B** | | | | | | | | | | |
| 1 Bayern München | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 11 |
| 2 Inter Milan | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 9 |
| 3 Sporting Lissabon | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 2 | 3 | -1 | 5 |
| 4 Spartak Moskva | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 4 | 10 | -6 | 2 |
| **Bólkur C** | | | | | | | | | | |
| 1 Liverpool | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 13 |
| 2 PSV Eindhoven | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 10 |
| 3 Bordeaux | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 3 | 6 | -3 | 4 |
| 4 Galatasary | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 1 |
| **Bólkur D** | | | | | | | | | | |
| 1 Valencia | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 12 | 5 | 7 | 13 |
| 2 Roma | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 7 | 4 | 3 | 7 |
| 3 Shakhtar Donetsk | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 5 | 10 | -5 | 5 |
| 4 Olympiakos | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 2 |
| **Bólkur E** | | | | | | | | | | |
| 1 Lyon | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 11 | 2 | 9 | 13 |
| 2 Real Madrid | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 10 |
| 3 Steaua Bucharest | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 4 |
| 4 Dynamo Kiev | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 3 | 14 | -11 | 1 |
| **Bólkur F** | | | | | | | | | | |
| 1 Manchester Utd | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 2 Celtic | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 7 | 6 | 1 | 9 |
| 3 Benfica | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 4 FC København | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 2 | 7 | -5 | 4 |
| **Bólkur G** | | | | | | | | | | |
| 1 FC Porto | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 9 | 4 | 5 | 10 |
| 2 Arsenal | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 10 |
| 3 CSKA Moskva | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 2 | 2 | 0 | 8 |
| 4 Hamuburg SV | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 4 | 13 | -9 | 0 |
| **Bólkur H** | | | | | | | | | | |
| 1 AC Milan | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 2 | 6 | 10 |
| 2 Aek Athen | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 7 |
| 3 Lille | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 6 |
| 4 Anderlecht | 5 | 0 | - | 3 | - | 2 | 5 | 9 | -4 | 3 |